# Venjingardystir í fótbólti

Um vikuskifti spældu fótbóltsliðini venjingardystir. Her eru nøkur av úrslitunum

| | |
|---|---|
| ÍF-B68 | 1-0 |
| NSÍ-KÍ | 2-0 |
| AB-B71 | 2-2 |
| Skála-B36 | 2-1 |
| HB-07 Vestur | 5-1 |
| B71-VB/Sumba | 2-0 |
| VB/Sumba-TB | 1-2 |



# Holst var liðformaður

Føroyski landsliðsspælarin Christian Lamhauge Holst var liðformaður hjá Lyngby, tá superligaliðið spældi venjingardyst í Esbjerg um vikuskiftið. Dystin vann Esbjerg 2-0, og bæði málini vóru gjørd í fyrra hálvleiki. Umframt Christian Holst var føroyski landsliðsspælarin Tem Hansen eisini við í hópinum hjá Lyngby. Tem var eykamaður, men kom á vøllin í seinna hálvleiki.

Neistin-StÍF 26-31 (12-15):

# Finaluplássið í vanda

**Hóast stórspæl frá Jacob Larsen, so tapti Neistin annan dystin á rað. Og nú eru bert trý stig niður til Kyndil í dystinum um FM-finaluna**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Alt kappingarárið hevur Neistin verið á hampuliga tryggari finalukós. Og fyri bara tveimum umførum tóktist finalusessurin púrasta vissur.

Men tann veruleikin er eisini broyttur. Sunnudagin taptu teir bláu aðru ferð á rað, og aftur hesa ferð var talan um greiðan ósigur.

Tvær broytingar vóru annars at síggja á liðnum hjá Neistanum hesaferð. Jacob Larsen hevur nú verið í Føroyum í eina tíð, men útlendingakvotan hevur havt við sær, at stóri danin als ikki hevur verið at sæð í málinum.

Sunnudagin var hann við frá byrjan, og eina løtu tóktist hann mest sum einsamallur vilja avgera dystin. Men hóast eitt bjargingarprosent, sum muni liggja heilt nær teimum 50, so var hetta ikki nóg mikið, tá StÍF við kvikum spæli tagaði Neistaverjuna sundur óteljandi ferðir.



*Jacob Larsen vísti satt stórspæl millum stólparnar, men tað var ikki nóg mikið hjá Neistanum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Hartil var Jakob Jónsson eisini við á liðnum hesaferð. Tað merkti so eisini, at Blagoje Buha ikki kundi koma á vøllin. Hóast aldurin er farin at tyngja, so er eingin ivi um, at Jakob kann verða góður styrkur hjá Neistanum, men hesa ferð hevði hann ilt við veruliga at seta seg ígjøgnum, tó at einstakar vakrar fríspælingar vóru á skránni.

## Reistust

Hjá StÍF ráddi um at reisa seg eftir finalutapið seinasta sunnudag, og tað varð gjørt við manér.

Verjan var mest sum alla tíðina uppi á tærnum, og ferðin á álopsspælinum varð í løtum skrúvað heilt í topp. At álopshóttanin er breið, sást aftur hesaferð, og í løtum varð David Edvardsen skumpaður út á veingin, so báðir Justinussen-beiggjarnir sluppu fram at á bakkunum.

Og tað var væl meira, enn Neistin megnaði at fylgja við. Endaligi sigurin gjørdist fimm mál, men var tað ikki fyri stórspælið hjá Neista-málverjanum, so kundi sigurin væl verið munandi størri.

## Finalan í vanda

Og tað ber so við sær, at Neistin nú av álvara merkir trýstið frá Kyndli. Bert trý stig eru nú at geva av, og enn er ein dystur eftir móti Kyndli. So kiksararnir skulu ikki verða serliga nógvir, áðrenn finaluplássið hjá teimum bláu kemur heilt alvorliga í vanda.

Hjá StÍF er finalan hinvegin trygg. Í teoriini kann enn kiksa, men so vilja ikki bara illa til – men heilt illa. Og við spæli, sum ber boð um, at steypafinalan milt sagt var ein kiksari, er tann vandin neyvan nakað, sum strandingar tosa serliga ítøkiliga um.

## FAKTA

**Neistin-StÍF 26-31 (12-15)**
**10 min:** 6-4
**20 min:** 9-10
**40 min:** 15-22
**50 min:** 21-26
**Málskjúttar**
**Neistin:** Karl Herup Olsen 7, Ingi Olsen 6, Jugoslav Djumic 6, Jóhan Brekstein 3, Tróndur Kragesteen 3, Dann Thorleifsson 1
**StÍF:** Sveinur Justinussen 7(4), Leivur Justinusen 5(2), Bárður Danielsen 5, Danni Syhler 4, David Edvardsen 4, Borgar Danielsen 3, Bent Djuhuus 1, André F. Danielsen 1, Alexandur Johansen 1
**Brotskøst:** Neistin 2, StÍF 7
**Útvísingar:** Neistin 2, StÍF 1
**Dómarar:** Hans Thomasen & Hanus Kúrberg

H71-VÍF 24-24 (12-11):

# Stríðast um bronsuna

**Eingin vinnari var í Hoyvík, tá VÍF vitjaði. Og enn eru báðir partar við í bronsudystinum**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Bæði H71 og VÍF hava havt trupult við at halda stórspælinum uppi í ár. Til tess hava báðir partar verið ov sveiggjandi í avrikum sínum.

Og sveiggjandi vóru tey eisini í dystinum sunnudagin, har spenningurin alla tíðina var í hásætinum, tó at tað góða spælið ikki altíð var eins sjónligt.

Fyrstu løtuna av dystinum vóru tað vestmenningar, sum vóru omaná, men H71 megnaði tó at svara aftur. Teir togaðu seg framum undan steðginum, og fyrsta korterið eftir steðgin gekk bara ein veg.

Vestmenningar vildu tó ikki geva seg, og teir stríddu seg eisin uppaftur. Somikið væl eydnaðist, at gestirnir at enda máttu iðra seg um, at teir ikki fingu bæði stigini við sær. Tríggjar ferðir móti dystarenda vóru tað nevnliga teir gulu, sum vóru á odda, men hvørja ferð megnaði H71 at svara aftur.

Seinastu sekundini var ein VÍF-avgerð eisini ávegis, men Bárður Brimvík valdi neyðbremsuna og reytt kort, tá VÍF kontraði. Og so varð tann álopsroyndin av ongum.

## FAKTA

**H71-VÍF 24-24 (12-11)**
**10 min:** 5-6
**20 min:** 6-9
**40 min:** 16-15
**50 min:** 21-21
**Málskjúttar**
**H71:** Dánjal Tórgarð 6, Halgir Dahl Olesen 5, Niels Viggo Niclassen 3, Gunnar Bláberg 2, Bárður Brimvík 2, Hans Kári Hansen 1, Poul Kjartan Dam 1, Christian Eli Zachariasen 1
**VÍF:** Agnar Joensen 8, Rúni Joensen 4, Regin Joensen 4, Niels Andreasen 3, Karl Johan Djurhuus 3, Joen P. Høgnesen 1, John M. Andreasen 1
**Brotskøst:** H71 4
**Útvísingar:** H71 3, VÍF 5
**Diskvalifikatión:** H71 1 (beinleiðis reytt)
**Dómarar:** Kristian Johansen & Dánjal Samuelsen

Stjørnan-VÍF 33-31 (17-14)

# VÍF spældi við

**Stjørnan vann æltaða sigurin móti VÍF, men seinastu løtuna minkaði munurin heilt nógv**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@soisialurin.fo*

VÍF hevði ikki tær stóru vónirnar undan vitjanini í Klaksvík, men tær fylgdu kortini so heilt væl við fyri steðgin.

Eftir steðgin hevði tó hug at skrædna, og Stjørnan var eitt skifti á odda við átta málum.

Móti dystarenda slakaði Stjørnan tó. VÍF fekk tá fatur um rætta endan, og við einum góðum háli minkaðu tær heilt nógv um munin. Nóg mikið til at fáa stig gjørdist hetta tó ikki, og Stjørnan tóktist alla tíðina hava neyðuga yvirskotið, skuldi tað av álvara staðið á.

## FAKTA

**Stjørnan-VÍF 33-31 (17-14)**
**10 min:** 6-5
**20 min:** 13-8
**40 min:** 24-16
**50 min:** 29-23
**Málskjúttar**
**Stjørnan:** Simona Petersen 10(2), Durita Christoffersen 8, Joan Midjord Djordjevic 5, Durita Ljósstein 3, Bára Skaale Klakstein 2, Anna Kristina Samson 2, Hanna Mikkelsen 1, Ella Petersen 1, Maria við Neyst 1
**VÍF:** Ioana Rapa 11(2), Liljan Djurhuus 9, Fríða Marjunardóttir 4, Finngerð Jensen 2, Heidi Joensen 2, Rannvá á Røgvu 1, Linda Johannesen 1
**Brotskøst:** Stjørnan 3, VÍF 2
**Útvísingar:** Stjørnan 2, VÍF 7
**Dómarar:** Karsten Joensen & Kristian Joensen